# Lissabonsáttmálin í gildi

Lissabonsáttmálin, sum er eitt slag av grundlóg hjá Evropasamveldinum, kom í gildi í dag næstan átta ár aftir, at tær fyrstu orðingarnar í sáttmálanum vórðu festar á blað. Við sáttmálanum koma nýggjar reglur um atkvøðugreiðslur í ES, og tey, sum fegnast um sáttmálan, siga, at hann ger ES meiri demokratiskt. Størvini sum ES-forseti og ES-uttanríkisráðharri, sum vórðu mannað herfyri, eru eisini úrslit av tí nýggja sáttmálanum. Í sambandi við at Lissabonsáttmálin kemur í gildi í dag, er hátíðarhald í portugisiska høvuðsstaðnum, har fleiri av ES-leiðarunum eru hjástaddir.



# Obama dýrur gestur

Hóast hann bara steðgar nakrar tímar, fer tað at kosta danska ríkiskassanum einar 50 milliónir krónur, at Barack Obama kemur til Keypmannahavnar. Amerikanski forsetin kemur til Danmarkar, áðrenn hinir ríkis- og stjórnarleiðararnir koma, og tað hevur noytt donsku myndugleikarnar at broyta trygdartiltøkini. Mogens Lauridsen hjá løgregluni í Keypmannahavn váttar fyri Politiken, at ferðin hjá Obama hevur kravt broytingar, men hann vil ikki siga, hvussu nógv vitjanin hjá Obama kostar løgregluni. Ríkisløgreglan váttar hinvegin, at vitjanin hjá Obama kostar løgregluni millum 40 og 50 milliónir krónur.

# Skálaberg rinda russum milliónir



*Síðan næstseinasta hósdag hevur Skálaberg verið undir russiskari umsjón, men nú røkist fyri eini loysn*

**Í 12 dagar hava teir 38 menninir á Skálabergi ligið 100 metrar úr Murmansk, har russar hava hildið teimum. Nú røkist fyri eini loysn, men sektin verður í milliónatali**

FISKIVINNA
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

– Nú mugu vit bara hava skipið út.

Hanus Hansen, reiðari á Skálabergi, hevur ásannað, at tað ikki ber til at fáa skipið út fyri onki, og tí hevur hann gingið við til, at russar koma við einum sektaruppskoti við minst seks nullum í morgin, og hann ætlar eisini at taka av.

Trætan hevur koyrt síðan næstseinasta hósdag, tá Skálaberg varð tikin til lands í Russlandi undir illgruna at hava fiskað meira enn 600 tons ólógliga.

Hetta vildu hvørki JFK, sum er reiðarí hjá Skálabergi ella føroyskir myndugleikar ganga við til, tí skipið hevur bara veitt kvotuna hjá Sundabergi, sum fyri tíð síðan varð seldur til Russlands, men loyvið er framvegis føroyskt.

Síðan tá hava samráðingar verið. Føroyingar halda uppá, at myndugleikarnir í Murmansk ikki hava fingið upplýsingarnar, sum føroyingar hava sent til Russlands, men russar kendu seg tryggar í síni søk.

Aðrir trupulleikar vóru eisini. Navni á skiparanum umborð varð ikki á einum lista hjá russum, og tað vildu teir ikki góðtaka, samstundist, sum Skálaberg bert hevur eitt avrit av fiskiloyvinum hjá skipinum, meðan russar vilja hava eitt veruligt eintak.

Hetta seinasta vilja vildu føroyingar ganga við til, hóast tað vanliga hevur verið góðtikið við einum avriti.

## Dró út

Hanus Hansen, reiðari, kendi seg upprunaliga trygg-an við, at ein loysn skuldi koma skjótt, men seinasta langa vikan hevur víst, at tað var sera trupult at finna nakra loysn.

Fleiri og fleiri vóru drigin upp í samráðingarnar um skipið. Føroyingar vóru umboðaðir av Fiskimálaráði, Uttanríkisráði, advokati hjá JFK og onkrum russum.

Í gjár byrjaðu fiskiveiðusamráðingar millum føroyingar og russar um kvotur komandi ár, og Hanus Hansen váttar, at hesar samráðingar kunnu hava gjørt sína ávirkan galdandi, nú russar hava gjørt av at koma við einum sektaruppskoti í morgin.

Fiskiveiðisamráðingarnar við russar eru norðuri við Gjógv, og Hanus Hansen dugir illa at ímynda sær, at úrslitið av hesum samráðingum koma at verða ávirkaðar av málinum við Skálabergi.

Men nú er greitt, at russar hava lovað at koma við sektaruppskoti í morgin. Hanus Hansen ætlar at taka av hesum, hóast talan er um milliónir, og tí roknar reiðarin við, at skipið fer úr Murmansk í morgin ella í ovurmorgin.

Tá siglir skipið heim. Um miðjan desembur skal skipið nevniliga seljast til Argentina.

# Lítil mongd bjargar Faroe Pelagic

**Hanus Hansen, stjóri í JFK, dylur ikki fyri, at hann fegin vil vera við at keypa Faroe Pelagic, hóast virkið sjáldan hevur koyrt væl. – Fyritreytirnar eru broyttar. Tað er so lítið at svartkjafti, at tað veldst um at fáa góðan prís og stutt at avreiða, og so hava vit eisini hesar sterku hollendingarnar við okkum, sigur hann**

SVARTKJAFTUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*



*Kollafjørð Pelagic letur upp um miðjan desembur, og Hanus Hansen roknar við, at virkið nú fer at bera seg*

Í gjár kom fram, at Eik, sum eigur Faroe Pelagic, sum er fyrrverandi Kollafjørð Pelagic, hevur gjørt av at leiga virkið út til hollendska felagið Parlevliet & Van der Plas og føroyska JFK, og givið feløgunum ein forkeypsrætt komandi árið.

Hanus Hansen, stjóri í JFK, hevur góðar vónir til virkið, sum virkar svartkjaft og frystir hann, hóast fleiri eru komin í trupulleikar av virkinum fyrr.

– Fyritreytirnar eru broyttar. Tað er so lítið at svartkjafti, at tað veldst um at fáa góðan prís og so skal eisini vera stutt at avreiða, og so hava vit eisini hesar sterku hollendingarnar við okkum, sigur Hanus Hansen.

Hann leggur afturat, at tað rættiliga skjótt verður greitt, um teir fara at keypa virkið frá bankanum, hóast forkeypsrætturin er galdandi fyri eitt heilt ár.

## Minni fiskur

Høvuðsorsøkin til, at Hanus Hansen hevur so góðar vónir, er at so lítið er til av svartkjafti, og tí veldst ikki longur um bara at hava so stóra mongd sum gjørligt.

– Nú mugu skipini hugsa um ein góðan prís og at spara so nógva olju sum gjørligt, so eg rokni við at vit kunnu fáa fisk frá ymisku skipunum í Føroyum, sum ikki frysta umborð, sigur Hanus Hansen, og greiðir frá, at Næraberg onki fer at hava við virkið í Kollafirði at gera.

Hollendingarnir eru stóri parturin í avtaluni um Kollafjørð Pelagic. Stjórin verður hollendingur og eini 50 fólk fara at arbeiða á virkinum, sum fer at byrja at virka svartkjaft um miðjan desembur.